www.sosialurin.fo

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| Daihatsu Charade | 17.000 | Des. | 1991 | 21.000,- |
| BMW 316 (1.6) EILER | 30.000 | Juli | 1997 | 129.000,- |
| Suzuki Baleno Van | 35.000 | Aug. | 1997 | 75.000,- Við MVG |
| Ford Escort Diesel | 86.000 | Aug. | 1996 | 103.500,- |
| Citroën BX 1.9 Diesel St. | 185.000 | Aug. | 1991 | 65.000,- Sýnaður í 2000 |
| Opel Astra 1.6 GLS | 66.000 | Sept. | 1995 | 99.900,- |
| Citroën Xantia 3.0 V6 | 34.500 | Juni | 1998 | 180.000,- |
| Ford Fiesta | 114.000 | Mai | 1989 | 23.000,- |
| Mitsubishi Lancer Diesel | 189.500 | Juli | 1990 | 23.000,- Sýnaður í 2000 |
| BMW 320i AVHEINTINGAR-TILBOÐ | 216.300 | Mai | 1987 | 19.000,- |
| GALLOPER 2.5 TDi - 7 pers. | 37.400 | Apríl | 1999 | 215.000,- 2 ára garanti |
| Fiat Scudo 1.9 TD | 130.000 | Mars | 1997 | 105.000,- Við MVG |
| Citroën ZX 1.9D Stw. | | Feb. | 1995 | 89.000,- |
| Opel Astra 1.7 TD | 81.000 | Des. | 1996 | 115.000,- |
| Mitsubishi L400 ksv. | 45.000 | Mars | 1998 | 138.000,- |
| Mitsubishi cosmos 4x4 | 90.500 | Aug. | 1998 | 115.000,- Við MVG |
| Opel Astra 1.6 4H | 60.000 | Mars | 1996 | 95.000,- |

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ
OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

AVHEINTINGAR-TILBOÐ
ISUZU PICK UP 4X4 • 226.500 km.
Árg. Okt. 1989 • Einans kr. 12.000,-

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866

Sosialurin - 311820

# Havnar kommuna umhugsað prutlkoyring í 19 ár

*Á býráðsfundi í kvøld fer býráðið at viðgera eitt mál um prutlkoyring, sum varð reist í 1979. Síðani 1981 hevur umsitingin kannað málið*

Eirikur Lindenskov

Løgið men satt. Tað tók teknisku nevnd hjá Tórshavnar býráð 19 ár at finna út av at heita á fútan um at taka av eina kunngerð frá 1975, sum bannar prutlkoyring í miðbýnum í Havn frá klokkan 21 á kvøldi til klokkan 6 á morgni.

Á býráðsfundi í kvøld verður til viðgerðar ein áheitan frá Ferðslunevndini um at taka av hesa kunngerð.

Málið byrjaði við, at nakrir havnarborgarar sendu býráðnum eitt skriv tann 16. juli 1979 um teirra ónøgd viðvíkjandi prutlkoyring í Havn.

Í brævinum verður víst til kunngerðina frá 22. mai 1975 um »afmærkning av færdslen i Tórshavn«, ið setur bann fyri prutlkoyring í ávísum gøtum í miðbýnum frá kl 21.00 til kl 06.00.

Í veruleikanum stendur hetta bann við, og eru tað tí nógvir ungir havnarborgar sum hesi seinastu 25 árini hava brotið hesa kunngerð uttan at vita av tí.

Men ferðslunevndin hjá býráðnum viðgjørdi hesa áheitan á fundi 5. mai 1981. Tá varð heitt á teknisku nevnd um at heita á Føroya landfúta um at taka av nevndu kunngerð, við tað at ein partur av umráðnum tá var komin undir aðra skipan, t. d. ein partur av Niels Finsensgøtu, har bann tá var fyri allari prutlkoyring.

Tekniska nevnd hevði fund um málið tann 19. mai í 1981, men gjørdi av at útseta málið.

Aftur var fundur í teknisku nevnd 9. juli í 1981, og tá var samtykt at taka upp samráðingar við fútan. Síðani kannar umsitingin málið.

Og aftur hevur tekniska nevnd fund 28 . februar ár 2000 - altso 19 ár seinni!!!!

Hesaferð er niðurstøðan: Mælt verður til at heita á fútan um at avtaka kunngerðina og um neyðugt at beina máli í býráðið.

1. februar í ár samtykti ferðslunevndin um at heita á býráðið um at taka av kunngerðina um prutlkoyring í miðbýnum.

Verður hetta samtykt, so kunnu prutlkoyrarar í framtíðini framvegis koyra prutl í miðbýnum - frameftir lógliga.

Leingi er tað, ið væl skal vera. Av býráðslimunum, sum í dag sita, eru tað bara Heðin Mortensen og Ingi Mohr, ið hava havt møguleika at fylgt hesum máli øll árini…

# Naturalistisk nostalgi – við nútímans penslastroki

Eirikur Lindenskov



Í dag klokkan 15 letur upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Tað er gøtumaðurin, Petur Mikkelsen, betur kendur sum Petur Prent, sum sýnir fram um 30 oljumálningar.

Petur sigur sjálvur um framsýningina, at hetta eru minni úr Gøtu. Hann er føddur og uppvaksin á Heygum úti í Grógv í Syðrugøtu, og flestu málningar eru útsýni higani, soleiðis sum hann minnist tað. Hann leggur dent á, at einki er málað eftir fotografium.

– Men so havi eg eisini málað nakað í sambandi við 1000 ára haldi fyri kristniboðani, sigur Petur Prent.

Á loftinum í Smiðjuni hevur hann hendan partin av framsýningini, ið hann nevnir »Givnir eru einglar góðir«.

– Har havi eg m. a. Havgrím og Brestir, tá teir drepa hvønn annan og Trónd, tá hann verður kristnaður, og tá hann doyr av sorg í 1035.

Heitið á hesum parti av framsýningini er sjálvsagt eftir sálminum, sum øll gøtufólk hava fingið inn við móðurmjólkini, tað eina ørindið hjá Gøtutróndi, Givnir eru einglar góðir. Hetta sigst vera elsti sálmur, sum yrktur er á føroyskum og av føroyingi.

Framsýningin hjá Peturi Prent er opin í dag til og við sunnudagin - allar dagar frá klokkan 15 til 19.



DAGFØR TEG sosialurin HALT SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

sosialurin

## Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
KAGGIN
Fríggja-og leygarkvøldið spæla
JULIANNE BOYS
5'ARI
frí.-, leyg.- og sunnukvøld frá kl. 17.00
Kaggin Kaggin Kaggin
Sosialurin - 311820
www.kaggin.fo

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

fk Matseðilin

Hósdagin 7. sept.:
Karbonadir

Fríggjadagin 8. sept.:
Lambafrikkasé

Leygardagin 9. sept.:
Kálvasteik

Mánadagin 11. sept.:
Medistapylsa

Týsdagin 12. sept.:
Knettir

Mikudagin 13. sept.:
Bayonne skine

Kostnaður 32,- kr.

***

Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95

Matstovan í Hoyvík

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið 9. september
"Njál & Mouritz" spæla
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT
Á SKY

Vilja tygum vi› í
Í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum *í b‡in*, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur